12/02-2020

Til Yvirfriðingarnevndina
V. Sorinskrivaran í Føroyum.
C. Pløjensgøta 1
Fo-110 Tórshavn

**Viðvíkjandi ætlaðari summarhúsbygging á matr. nr. 43 í Saksun.**

Saksunar bygdafelag, ið er eitt áhugafelag fyri fólk við serligum áhuga og alski fyri Saksunarbygd, er kunnað um umsókn frá Sunda kommunu, ið snýr seg um bygging av 10 til 30 frítíðarhúsum nærhendis Gjónni í Saksun.

Nevndin í Saksunar bygdafelag hevur havt málið til viðgerar á nevndarfundum 18/01-2020 og 12/02-2020, og hevur hesar viðmerkingar til málið:

1. Kloakviðurskifti
   Í løtuni er eingin kloakskipan í bygdini. Sum støðan er í løtuni renna allar kloakkir í bygdini út í áirnar, og tey viðurskiftini eiga at verða fingin í rættlag áðrenn meira verður bygt.
   Bygdafelagið er stúrið um vaksandi nøgdina av frárensli í áirnar og árinini hetta kann hava á lívfrøðina í áunum og á Pollinum.

2. Varsemi.
   Saksunar bygdafelag er av teirri fatan, at Saksun er sera viðbreki øki í krevur, at byggiætlanir verða gjørdar við serligum varsemi, og neyðugt er við vælumhugsaðum, yvirordnaðum byggiplanum.
   Bygdafelagið tekur eisini undir við undanfarnu avgerðum hjá Yvirfriðangernevndini, har Yvirfriðingarnevndin hevur noktað summarhúsætlanum grundað á, at eingin yvirordnað byggiætlan er gjørd fyri bygdina. Víst verður til undanfarnu mál hjá Yvirfriðingarnevndini: J-nr. 30/80 frá 10 /06 1980,
   J-nr. 08.02.09.2012-15.7 frá 02/10-2012 og J-nr. 08.02.09.2013-55.2 frá 17/12-2013
   Bygdafelagið er av teirri áskoðan, at áheitanin hjá Yvirfriðingarnevndini til friðingarnevndina fyri Streymoyar sýslu dagf. 17. desembur 2013, um at taka upp til viðgerar friðing av Saksun í síni heild, eigur at verða tikið uppaftur og avgreitt áðrenn meira verður bygt.

3. Býarplanur.
   Tá býarplanurin fyri Saksun var gjørdur og hoyringsumfarið var í 2018, vóru flestu Saksuningar av teirri fatan, at møguleikarnir fyri byggivirksemi vóru heldur stirvnir og man óttaðist óskipaða bygging. Tí vóru m.a. umrødda økið ávíst sum potentielt byggiøki til summarhús. Eingin hevði tá væntað, at Sunda kommuna fór at taka so rívan til og draga inn og byrja at selja út alt útlagt byggiøkið har umsøkjarar biðja um

tað. Vit eru stúrin um, hvør avleiðingin verður, um hendan umsøknin verður gingin á møti og líknandi umsóknir koma til øll útløgdu byggiøkini í bygdini.

4. Fagurfrøði
   Nevndin heldur, at um fyriliggjandi uppskot var lagt inn í annað umhvørvi, kundi tað verið væleydnað, men halda ikki, at tað harmonerar við tað bygging ið frammundan er á staðnum. Vit halda ikki at 10 heilt meinlík hús, løgd uppat hvørt øðrum stuðlar uppundir serføroyskan byggisið. Harumframt halda vit at útsýnið og dámurin av bygdalagnum verður skalaður og man kemur at fáa eina fatan av vinnuligari summarhúsbygging sum tað fyrsta man kemur til bygdina. Hettar er eftir okkara tykki ikki í samsvar við §2 stk. 5 í nattúrufriðingarlógini.

19. juni 2019 vóru allir Saksuningar innkallaðir til kreppufund á kommunskrivstovuni í samband við, at allir borgarar í bygdini høvdu mótmælt eini aðrari byggiætlan hjá Sunda kommunu, har ætlanin var at byggja upp til 100 parkeringspláss og ferðafólkamiðstøð á Nesinum beint omanfyri friðaðu Saksunar Kirkju, og beint frammanfyri friðaðu húsini í Dúvugørðum. Hóast gøla stóðst av hesum, var tá einki sagt um fyriliggjandi summarhúsætlan, ið byrjaði samstundis sum parkeringsætlanin.

Tá var annars semja um, at Sunda kommuna skuldi steðga parkeringsætlanini og taka størri atlit til borgararnar í Saksun og ynski teirra, og at samskifti við Saksuningar skuldu styrkjast.

Avtala var at kommunan skuldi arbeiða fyri at minka um bágarnar av ferðavinnu.

Vit meta ikki, at verandi býarplanurin og mátin hann verður umsitin tekur neyðug atlit til tær avbjóðingar bygdin hevur og tí fara bogarar, saman við bygdafelaganum, í næstum at taka stig til at býarplanurin skal endurskoðast.

Vit vóna, at hesar viðmerkingar okkara verða tiknar til eftirtektar, at umsøknin verður noktað og at heitt verður á náttúrufriðingarnevndina fyri Streymoyar sýslu um at avgreiða málið um friðing av Saksun í síni heild smbr. §6 í friðingarlógini.

Viðheft er faklig meting frá dulnevndum arkitekti.

Vinarliga Nevndin í Saksunar bygdafelag.

Jóhan Jógvansson

André Kruse

Símun Svartá

Beinta Jógvansdóttir

Marita Svartá

Herálvur Hansen

Jógvan Magnusson